## 17 ára gomul ákærd fyri at koyra við kenning

LØGREGLUTÍÐINDI
*Ingrid Bjarnastein*

Náttina til sunnudagin varð ein 17 ára gomul genta tikin í Leirvík. Hon hevði tikið ein bil og var farin at koyra. Onki koyrikort hevði hon, og afturat tí, verður hon eisini ákærd fyri at koyra við kenning.

Dj-show var á Kambsdali leygarkvøldið, og politiið í Runavík fekk fráboðan um okkurt smávegis herverk. Eitt bilspegl varð brotið, men politiið fann útav, hvør hevði brotið tað, so viðkomandi sleppur at gjalda fyri spegilð.

### Kanna fiskireiðskap

Teir, sum fiska laks í Skálabotni og í Funningi, skulu ikki halda, at teir kunnu brúka tann reiðskapin teir hava hug til.

Politiið í Runavík er nevniliga farið undir at kanna reiðskapin hjá hesum fiskarunum, tí hvørt ár, so fær politiið boð um, at ólógligur reiðskapur verður nýttur.

– Vit frætta ofta, at fiskararnir brúka krøkjarar og pilkar ístaðin fyri húk, og hetta er ikki loyv. Tað skal verða reiðskapur, sum fiskurin kann gloypa, tí annars kunnu teir bara rykkja ígjøgnum torvuna av fiskinum, sigur vakthavandi á politistøðini í Runavík.

Hann leggur afturat, at teir hava tó ongan ólógligan reiðskap funnið enn, og síðani politiið er byrjað at hava uppsýn við hesum, er mestsum allur tann ólógligi reiðskapurin horvin.

Politiið plagar at koyra framvið upp til eini tríggjar ferðir um dagin, og tá verður steðgað á og hugt eina løtu.

Umframt at hava kannað fiskireiðskap, so hevur politiið eisini gjørt nakrar paragraff 13 kanningar. 45 bilar vórðu kannaðir og alt var í lagi.

## Harðskapur í Klaksvík

LØGREGLUTÍÐINDI
*Ingrid Bjarnastein*

Um vikuskiftið var nógv fólk í býnum í Klaksvík. Og sum ikki einaferð har full fólk eru savnað, er onkur farin til hendurs.

Politiið í Klaksvík sigur, at talan er um tvey harðskapsmál. Tað fyrra komst av fullamannaprátið. Tveir mans vóru farnir til hendur.

– Tað er tað vanliga fullamannaprátið. Teir vilja vita, hvør er sterkastur, og í hesum førinum endaði tað við, at annar fekk eitt knæ upp í andlitið, sigur vakthavandi í Klaksvík.

Hitt, sum eisini varð kallað eitt harðskapsmál, snýr seg um ein brotnan rút í diskotekinum Barok.

Bæði málini hendur leygarkvøldið aftaná midnátt.

## Oyðiløgdu luftskipanina í tunli

LØGREGLUTÍÐINDI
*Ingrid Bjarnastein*

Ein lastbilur, sum var á veg suður eftir ígjøgnum Kollafjarðartunnilin, oyðilegði leygardagin luftskipanina í tunlinum.

Lastbilurin hevði ein bát og ein krana í lastini, og bilførarin hevur ikki dugað at mett um hæddina á lastini. Tí koyrdi bilurin á luftskipanina í tunlinum og skipanin datt niður. Hetta hendi í sunnara endanum á tunlinum.

Orsøkin til óhappið er ósketni, upplýsir politiið í Havn.

# Listastevnan loksins liðug

**Listastevnan 2002, sum byrjaði tann 3. august, endaði loksins sunnukvøldið. Fyrireikararnir eru væl nøgdir við úrslitið, men tó glaðir fyri, at alt tað strævna arbeiðið er yvirstaðið**

LISTASTEVNAN 2002
*Ingrid Bjarnastein*



*Birgir Kruse er væl nøgdur við Listastevnuna í ár. Og nú verður farið í holt við at fyrireika næstu stevnuna, sum verður í døgunum 7. – 17. august*

*Savnsmynd*

Sunnukvøldið varð lagt upp fyri tí heilt stóra brakinum á Listastevnuni 2002. Edda – Feigdargullið við leikbólkinum Sequentia úr New York skuldi á pall, og harvið eisini seta eitt punktum fyri Listastevnuna 2002.

Fyrireikararnir eru stak væl nøgdir við úrskurðin av Listastevnuni í ár.

– Tiltøkini hava verið væleydnað, bæði artistiskt og hvat áskoðarum viðvíkur, sigur Birgir Kruse, sum var formaður í stýrinum fyri Listastevnuna 2002.

– Hetta hevur verið sum ein stór ynskikonsert. Nøkur tiltøk hava verið útseld, harav næstan øll sjónleikatiltøkini.

Stýrisformaðurin nevnir eisini, at nógvar positivar afturmeldingar hava verið um millum annað norska sangaran Sigvard Dagsland og Runrig.

– Fá kendu norska sangaran frammanundan, og eg haldi, at tey flestu vórðu væl nøgd við hansara framførslu.

– Tað hevur annars eydnast okkum, at hava eitt breitt úrval av tiltøkum. Flestu tiltøkini vórðu eisini væl fyrireikað. Men ein kann siga, at tað er ein »lætti« at Listastevnan nú endiliga er liðug, og vit kunnu fara í holt við okkurt annað, sigur Birgir Kruse.

Stýrisformaðurin skal annars til Noreg fyri Norðurlandahúsið í morgin, mikudagin, har hann skal luttaka á einum filmfestivali. Norðurlandahúsið fer undir at gera okkurt við film næsta ár, og nú eru tey boðin við til hendan festivalin, har allir filmsframleiðararnir í Norðurlondum luttaka.

Birgir Kruse, sum hevur verið formaður í stýrinum fyri Listastevnuna, er nú næstformaður, meðan Helga Hjørvar er formaður fyri Listastevnuna 2003, sum verður í døgunum 7. – 17 august.

# Svøvnur møguliga orsøk til bilóhapp

**Sunnukvøldið fór ein bilur útav við Høgareynið millum Vestmanna og Kvívík. Løgreglan metir, at svøvnur møguliga er orsøkin til óhappið**

BILÓHAPP
*Ingrid Bjarnastein*

Sunnukvøldið klokkan 18.30 fekk politistøðin í Havn boð frá Alarmsentralinum um, at ein bilur var farin útav millum Vestmanna og Kvívík.

Ein kona, sum var á veg úr Havn til Vestmanna, koyrdi bilin. Hon hevði koyrt av vegnum, bilurin var farin runt og konan varð slongd runt í bilinum. Konan fekk skaða í annað beinið og fótin. Politiið mátti fáa hjálp frá brandmonnunum í Vestmanna fyri at fáa konuna leysa, tí beinið lá kleimt millum hurðina og ein stólpa. Síðani var hon flutt við sjúkrabili til Havnar.

Politiið heldur, at orsøkin til óhappið kann møguliga vera, at konan er sovnað. Hon hevur helst heldur ikki sitið í trygdarbeltið, tí so høvdu skaðarnir verið minni, verður mett av politinum.

# Ólæstur bátur

LØGREGLUTÍÐINDI
*Ingrid Bjarnastein*

Fríggjadagin fekk politiið í Havn boð um, at ein bátur, sum lá niðri á Skálatrøð hevði motorin í gongd, hurðarnar ólæstar, men ongin var umborð. Hetta vísti seg tó bert at vera ósketni frá eigaranum, sum hevði gloymt at sløkkja motorin og læsa bátin. Onki varð stolið úr bátinum og heldur onki herverk var gjørt á hann.

Annars verður sagt av politistøðini í Havn, at hetta hevur verið eitt av teimum frægu vikuskiftunum. Á politistøðini hava verið fýra yvirnáttandi gestir vegna fyllskap.

Tó harmast vakthavandi á politistøðini um øll tey fullu fólkini, sum eru í býnum um vikuskiftið.

-– Tú sært tað ongastaðni í heiminum, at ein býur kókar av fullum ungum fólki til klokkan 6 – 7 um morgunin, sigur vakthavandi á politistøðini í Havn, sum tó leggur afturat, at onki herverk, ongir brotnir bilar ella líknandi hava verið hetta vikuskiftið.

ítróttur
Nr. 157 • týsdagur • 20. august 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

Havnardrongurin Sigmund Mikkelsen:

# Fótbóltsavlamin sum 18 ára gamal

**Ein bjørt fótbóltsframtíð lá fyri framman hjá Sigmundi Mikkelsen, men álvarsamir skaðar høvdu við sær, at vónin brast.**

SAMRØÐA
*Páll Holm Johannesen*



*Ungi havnarmaðurin, Sigmund Mikkelsen, hevur verið á danska U15-landsliðnum, og var liðfelagið hjá m.ø.Michael Silberbauer, sum í morgin møguliga fær debut á danska A-landsliðnum ímóti Skotlandi.*

*Mynd: Finnur Justinussen*

Ungi havnardrongurin, Sigmund Mikkelsen, hevði eina bjarta fótbóltsframtíð, har stórfeløg sum Tottenham og PSV vóru til reiðar at bjóða honum sáttmála, men í dag er 20 ára gamli Sigmund Mikkelsen fótbóltsavlamin. Hann hevur slitið krossbandið tríggjar ferðir, og læknarnir hava gjørt Sigmundi greitt, at hann ikki longur kann spæla fótbólt.

### Spælt á U15 landsliðinum hjá Danmark

Sigmund byrjaði at spæla fótbólt sum 5 ára gamal í HB, men eftir, hann fór í skúla, skifti hann til grannarnar úr B36. Sigmund fortelur, at flestu floksfelagarnir spældu í B36, og tí valdi hann at skifta felag.

Í B36 gekk væl. Liðið vann fleiri meistaraheiti, og evnini hjá Sigmundi vóru ikki torfør at fáa eyga á. Tá mamma Sigmund í 1994 slapp inn á designaraskúla í Danmark, fluttu tey til Farum at búgva.

- Ætlanin var, at vit skuldu vera í Danmark í eitt ár fyri fyrst, men hetti broyttist skjótt, tí okkum dámdi væl í Danmark, og vit valdu at búseta okkum har, greiðir Sigmund frá

Ikki meir enn komin til Danmarkar, byrjaði Sigmund at spæla á liðnum hjá Farum, og væl gekst. Hann kláraði seg so mikið væl, at boð vóru eftir at til úttøkuvenjing hjá U15-landsliðnum.

Hóast Sigmund var eitt ár yngri, enn flestu liðfelagarnir á danska U15-landsliðnum, so eydnaðist tað honum spæla seg á liðið. Á U15 liðnum hjá dønum í 1996 taldust leikarar sum Tom Kristensen AGF, Allan Olesen Brøndby, Jonas Smith og Michael Silberbauer, báðir AAB.

Sigmund greiðir frá, at longu tá sást týðuliga, at ein maður sum Michael Silberbauer, sum í dag er mettur at vera ein tann mest evnaríki spælarin í Superliguni, hevði sera góð evni, og kundi koma langt við fótbóltinum.

Hóast fyrrverandi liðfelagin hjá Sigmundi enn hevur aldur til U21-landsliðið, so hevur Morten Olsen sent boð eftir Michael Silberbauer til A-landsliðið. Tá danir í morgin møta Skotlandi á Hampden Park, er møguleiki fyri, at evnaríki AAB-spælarin og fyrrverandi liðfelagin hjá føroyinginum, kann fáa sín fyrsta dyst á danska A-landsliðnum.

### Fekk sáttmála við Brøndby

Eftir at Sigmund var komin á U15-landsliðið, gjørdist greitt, at um hann skuldi menna seg meir sum fótbóltsspælara, varð hann noyddur skifta felag.

- Mær dámdi ótrúliga í Farum, men okkara lið spældi ikki í fremstu dreingja-deildini, og tí varð eg noyddur at skifta felag.

Trý feløg vóru áhuga í føroyinginum, og tey vóru Brøndby, Herlev og FCK. Valið fall á Herlev, har fýra av liðfeløgunum í U15-landsliðnum eisini spældu. Sigmund kendi eisini væl venjaran hjá Herlev, og tí var ikki so løgið at tað júst gjørdist Herlev, sum føroyingurin valdi.

Tíðliga um heystið í 1997 var Herlev á venjingarlegu í Fraklandi, og tá fór krossbandið hjá Sigmundi fyri fyrstu ferð. Uppvenjingin gekk væl, og Sigmund kom rættiliga fyri seg aftur, og varð ein av berandi kreftunum á dreingjaliðnum hjá Herlev.

Í 1998 vóru evnini so eyðsýnd hjá havnardronginum, at stórfelagið Brøndby knýtti tann tá 16 ára gamla Sigmund Mikkelsen at felagnum. Umframt Brøndby, høvdu útlendsk feløg eisini varnast góðu evnini hjá føroyinginum. Áðrenn Sigmund skuldi byrja í Brøndby, var ætlanin, at hann skuldi til royndarvenjingar hjá so stórum feløgum sum Tottenham, Liverpool og PSV.

Men áðrenn tann heilt glæsiliga fótbóltsframtíðin byrjaði, endaði hon. Tá farið var undir venjingina í Brøndby í januar mánaði í 1998 fór krossbandið aftur.

– Eftir at bert 15 minuttir vóru farnir av míni fyrstu venjing í Brøndby, reyk krossbandið aftur, og tað var so mín tíð í Brøndby, sigur Sigmund

Sigmund vísir tó á, at hóast tað bert bleiv til teir fimtan minuttirnar í Brøndby, so slepti felagið ikki honum uppá fjall, men vóru honum sera hjálpsom við uppvenjingini. Skaðin hesaferð gjørdist sera drúgvur, og ikki fyrr enn eitt ár seinni, kundi Sigmund aftur spæla bólt.

Tað gekk tó ikki long tíð, so var aftur galið. Sigmund, sum alla sína tíð í Danmark búði í Farum, var farin venja til stuttleikar við liðnum hjá Farum, og so fór krossbandið fyri triðju ferð. Dómurin var eisini harður, tí læknarnir boðaðu Sigmundi frá, at knæðið fór ongantíð at verða nóg sterkt til, at hann kundi spæla fótbólt aftur á hægsta stigi.

### Hørð tíð

Spurdur um hvussu tað var at fáa at vita, at ein aldrin aftur kundi spæla fótbólt, svarar Sigmund, at tað var ein sera torfør tíð, tí hann ætlaði sær veruliga at satsa uppá fótbóltin.

– Eg fekk at vita frá øllum, at eg kundi røkka langt við fótbóltinum, bara eg legði nóg nógv fyri. Tað er tó ikki nakar størri trupulleiki í dag, men tá eg síggi spælarar sum Michael Silberbauer og Allan Olesen spæla í sjónvarpinum, leita tankarnir ofta aftur á fótbóltin, og til spurningin, um hvussu langt eg kundi komið, um eg ikki varð nógv darvaður av skaðum, greiðir Sigmund frá.

Sigmund fortelur eisini, at ein av orsøkunum til at hann flutti aftur til Føroya var, at øll fólkini uttan um hann mintu hann aftur á tíðina við fótbóltinum, og tað gjørdi ikki støðuna léttari.

### Venur í dag HB-kvinnurnar

Í 2000 flutti Sigmund aftur til Føroya, har hann í dag er í læru í klædnahandlinum Skálki.

Fótbólturin er tó ikki heilt sleptur, tí í dag er Sigmund venjari hjá 1.kvinnuliði hjá HB.

– Mær dámar sera væl at vera venjari, tí tað er torført at sleppa fótbóltinum heilt, greiðir Sigmund frá.




*- At fáa at vita, at ein aldrin kundi spæla fótbólt á høgum stigi, var sera torført, sigur Sigmund Mikkelsen, sum í dag er í læru í klædnahandlinum Skálki.*

*Mynd: Finnur Justinussen*